

# Hilmar fer at verja PhD-ritgerð um seismikk

Deil:



**Jan Müller**

31.07.2014 - 22:52

Oljan.fo

Fríggjadagin 15. august 2014 fer Hilmar Simonsen at verja PhD-ritgerð sína “Acquisition, processing and geologic interpretation of reflection seismic data from high- and low-resolution surveys in the Faroe Islands”. Verjan verður á Vinnuháskúlanum og byrjar kl. 13:00.

Hilmar hevur granskað í seismiskum dátum upptiknar í føroyskum basaltøki. Vísundaligu kanningarnar spenna yvir trý høvuðsevni, ið kunnu flokkast sum 1) menningarætlan fyri optimala upptøku og viðgerð av refleksións-seismiskum dátum, 2) samanbinding av boridátum og seismiskum úrskurðum, og 3) eftirkanning av jarðfrøðiligum hypotesum.

Hilmar hevur gjørt sína gransking á Náttúruvísindadeildini hjá Fróðskaparsetrinum, og vegleiðari hansara var Dr. Robert James (Jim) Brown.

PhD-ritgerðin liggur alment frammi á Landsbókasavninum.

Til ber at lesa meira um PhD-ritgerðina hjá Hilmari á heimasíðuni hjá Fróðskaparsetri Føroya, www.setur.fo